## Roma basti Inter

Italska Super Cup, sum er dysturin ímillum meistararnar og steypavinnararnar frá síðsta kappingarári, var á skránni um vikuskiftið, og her møttust Inter og Roma. Ígjøgnum dystin hevði Inter fleiri góðar málmøguleikar, men í málið vildi bólturin ikki, Í staðin var tað Roma, sum fekk einasta málið í dystinum, tá dómarin dømdi brotsspark,eftir at Totti var feldur. Daniele De Rossi skoraði úr 11 metrum, og sostatt vann Roma italska Super Cup.




## Bayern München í serflokki

Tvey av liðunum, sum síðstu árini hava kappast um týska meistaraheitið, møttust í gjár, tá Werder Bremen tók ímóti Bayern München. Men liðið úr München vísti enn einaferð, at teir ikki ætla sær einki í ár. Teir hølvaðu nevniliga Bremen av, og endaliga úrslitið gjørdist 4-0. Málini blivu skotin av Franck Ribery, Luca Toni, Hamit Altintop og Andreas Ottl, og við sigirinum hevur Bayern fult stigaltal eftir tveir dystir, og málmunurin er 7-0.

# Kvinnurenningin í góðum veðri




**Undirtøkan var góð, tá Kvinnurenningin var á skránni um vikuskiftið. 143 kvinnur gjøgnumførdu renningina í allar besta veðri**

RENNING
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Veðrið var av tí allarbesta kring alt landið leygardagin, og hetta var avbera gott fyri kvinnurnar, sum ætlaðu sær til Kvinnurenning í Havn. Renningin hjá kvinnunum byrjaði niðrið í Hoydølum kl. 16, og undirtøkan var sera góð.

Kvinnurenningin bleiv eisini hildin í einum sera vøkrum umhvørvi. Kvinnurnar byrjaðu niðri við skúlan í Hoydølum, og so bleiv runnið niðan brekkuna í Hoydølum og yvir til tyrlupallin, har kvinnurnar so runnu oman eftir gøtuni, sum førir aftur til Hoydalar. Hesin teinurin bleiv lagdur aftur um tvær ferður, áðrenn renningin var liðug.

Og tað vóru nakrar sera væl upplagdar kvinnur, sum møttu upp í Hoydølum, og tað alt kom til stykkis vóru tað 143 av kvinnunum, sum gjøgnumførdu Kvinnurenningina. Tær flestu runnu, men tað vóru tó eisini nakrar, sum valdu at ganga henda vakra teinin.

Sum skilst á fyriskiparunum, so gekk tiltakið sera væl, og tað kom ikki minst væl við, at veðrið var av tí allarbesta.

Tá tann síðsti luttakarin var komin á mál varð lutakast ímillum allar luttakararnar um 11 vinningar frá ymiskum fyritøkum. Poul Hansen, MBM og Føroya Bjór høvdu eisini latið frukt, poptop og sodavatn til luttakararnar, tá hesir komu á mál, og so sótu kvinnurnar og hugnaðu sær eina løtu niðri í Hoydølum, eftir at tær vóru komnar á mál.

Sum heild var hetta ein sera góður og hugnaligur dagur fyri tær kvinnurnar, sum tóku lut í Kvinnurenningini.

### FAKTA

Úrslit frá Kvinnurenningini

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Sunnuvá Bjarnastein | 19.09 |
| 2. | Frida Poulsen | 19.37 |
| 3. | Ann Thomsen | 19.44 |
| 4. | Tordis D. Eiriksfoss | 20.02 |
| 5. | Óluva Zachariasen | 20.26 |
| 6. | Jóngerð Høgnesen | 20.44 |
| 7. | Kristina Samuelsen | 20.56 |
| 8. | Durita Djurholm | 21.11 |
| 9. | Paula Mohr | 21.39 |
| 10. | Morid Jacobsen | 22.01 |

# ÍF liggur væl á kósini

**Eftir langa sigursrøð eru fuglfirðingar á uppflytingarplássi, sum teir leygardagin við sigri á toppliðnum tóku frá vágamonnum, ið einki fingu burturúr grannauppgerðini**

1. DEILD
*Jóannes Hansen*

B68 fer ikki at flyta upp í august mánað, sum tað í síðstu viku varð róð fram undir kundi gerast veruleikin. Uppflytingin er útsett, men hóast B68 leygardagin rudduliga tapti á heimavølli ímóti ÍF, so er lítil ivi um, at B68 næsta kappingarár verður í Formuladeildini.

Higartil hevur FSV04 verið lítil favorittur í kappingini um annað uppflytingarplássið, men tað eru vágamenn ikki longur. Eftir ikki so sannførandi byrjan upp á kappingarárið, hevur ÍF av álvara tikið sær um reiggj.

At fuglfirðingar hava sett sær fyri aftur at gerast partur av bestu deildini sást á Svangaskarði leygardagin. Undan hesum umfarinum hevði B68 bara eina ferð mist stig – í málleysum javnleiki ímóti TB. Allar hinar dystirnar høvdu toftamenn vunnið.

Móti ÍF var motivatiónin sera lítil hjá B68, og tað varð rudduliga sektað. ÍF var greitt omaná alla tíðina. Fuglfirðingar fluttu seg meiri og betur, teir løgdu meiri fyri í nærdystunum, og teir skaptu fleiri møguleikar enn B68, sum bara hevði ein upplagdan málmøguleika.

3-0 ÍF sigurin var einki ov stórur. Seks tær seinastu ferðirnar hevur ÍF fingið fult – 18 stig - við samlaða málmuninum 21-2!

Samstundis hevur FSV04 burturúr seks teimum seinastu umførunum fingið trettan stig við málmuninum 11-8.

Hesa ferð tapti FSV04 grannauppgerðina í Sørvági 2-0. Í 24. umfari fer FSV04 at fáa vitjan av ÍF, og í 25. umfari skal FSV04 spæla á Svangaskarði. Ikki minst úrslitini í hesum báðum uppgerðunum fara at verða avgerandi fyri, um tað verður ÍF ella FSV04, sum fer at flyta upp.

Men í løtuni bendir nógv á, at tað verður ÍF, sum saman við B68 fer at flyta upp í Formuladeildina.

### FAKTA

1. deild menn

Útsettur dystur
SÍ-HB 1-2 (1-1)
1-0: Kim Poulsen, 12.
1-1: Dánjal Davidsen, 14.
1-2: Høgni Warberg, 50.

20. umfar, 18. august
KÍ-TB 0-2 (0-1)
0-1: Sasa Jovanovic, 24.
0-2: Jón Johannesen, 84.
Reytt kort: Heri Thorsteinsson, KÍ (12), Erling Fles, KÍ (88)

B68-ÍF 0-3 (0-1)
0-1: Nenad Saric, 26.
0-2: Frank Poulsen, 58
0-3: Danjal Pauli Højgaard, 88
Reytt kort: Alexandro Castilho, B68 (45)

B36-HB 0-3
0-1: Høgni Hansen, 25.
0-2: Torkil Kollsker, 60.
0-3: Høgni Hansen, 75.

SÍ-FS Vágar 04 2-0 (0-0)
1-0: Johan Petur á Stongum, 55.
2-0: Georg Haraldsen, 65.

NSÍ-LÍF 1-3 (1-0)
1-0: Øssur Dalbúð
1-1: Andrias Lava Olsen, 60.
1-2: Andrias Lava Olsen, 64.
1-3: Andrias Lava Olsen, 90.
Reytt kort: Hjartvard Hansen, LÍF (40.)